# »Et barn har brug for en voksen til hver hånd«

**Føroya Psykiatriskir Sjúkrarøktarfrøðingar (FPS), Sinnisbati og Dansk Psykiatrifond skipaðu mánadagin fyri ráðstevnu í Norðurlandahúsinum sum innleiðslu til upplýsingarátakið við psykiatribussinum, sum nú ferðast kring landið. Heili 400 fólk vóru komin saman til fyrilestrar, pallborð og orðaskifti. Eitt hæddarpunkt var, tá danski professarin í sálarfrøði, Per Schultz Jørgensen, hevði fyrilestur við heitinum, »Et barn har brug for en voksen til hver hånd«**

RÁÐSTEVNA
*Heini í Skorini*
*heini@sosialurin.fo*



*Umleið 400 fólk lurtaðu í Norðurlandahúsinum við andakt eftir danska professaranum í sálarfrøði, Per Schultz Jørgensen. - Samanborið við 1976 hava nógv fleiri børn upplivað hjúnarskilnaðin. Fleiri eru í dag materielt forkelaði, men eisini sosialt forsømd og latin til sín sjálvs, segði danski sálarfrøðingurin, sum eisini vísti á eitt veikt sosialalt eftirlit sum úrslit av einum samfelagi í upploysn*

Á ráðstevnuni í Norðurlandahúsinum var danski professarin í sálarfrøði, Per Schultz Jørgensen, av áhugaverdastu nøvnunum. Eitt stúgvandi fult Norðurlandahús lurtaði við andakt eftir framløgu hansara við heitinum, »Et barn har brug for en voksen til hver hånd«.

### Álit eitt lyklaorð

Danski sálarfrøðingurin byrjaði fyrilesturin at lýsa, hvørjar fortreytirnar skulu vera fyri einum góðum barndómi. Oyru áhoyrarans spílaðust út, og við hjartaligu og kenslubornu rødd síni hevði Per Schultz Jørgensen orðið í síni makt.

- Børn skulu fyrst og fremst hava fólk at hava álit á í bæði familju og millum vinir. Álit á fleiri persónum er ein fortreyt fyri einum góðum barndómi, vóru fyrstu og rámandi orðini hjá Per Schultz Jørgensen.

Hann vísti víðari á, at við áliti verða felags normar skaptir, sum síðani føra til tryggleika og fastar karmar. Hetta gevur barninum avbjóðandi møguleikar at luttaka í sosiala lívinum.

Uttan grundleggjandi álit á fleiri persónar er úrslitið sambært Per Schultz Jørgensen harafturímóti ótryggleiki, ræðsla, hjálparloysi og atburður, sum fer út um ásett sosial mørk.

### Stóru regnskjólini horvin

Danski sálarfrøðingurin fór síðani at lýsa samtíðina, vit liva í, og hugleiddi hann um ein broytandi og ótryggan heim.

- Føstu karmarnir við felags normum, virðum og siðum eru horvnir, og í einum samfelagi í upploysn er úrslitið veikari sosialt eftirlit, segði danski professarin avgjørdur.

Hann vísti víðari á, at við hesum eru stóru samfelagsligu regnskjólini horvin, sum verja og hjúkla um ein. Vaksandi einstaklingageringin hevur elvt til, at tey veiku detta niður ímillum, og tískil er eitt barn í dag í stórum vanda fyri sálarligum trupulleikum.

- Vandin fyri sosialari marginalisering er øktur, m.a. tí krøvini at luttaka í samfelagnum eru broytt, vóru millum niðurstøður framleggjarans.

### Frá materialismu til sosialisatión

Í einum vælferðarsamfelagi og materiellari yvirflóð vísti Per Schultz Jørgensen á, at høvuðstrupulleikin í dag er broyttur. Fyrr var høvuðsuppgávan at tryggja eitt materielt grundarlag, tá lítið av pengum var, men í dag er trupulleikin og uppgávan at trygga barninum sosialan tryggleika. Í hesum høpi endurgav danski sálarfrøðingurin ein fólkaskúlalærara, sum í mong ár hevur arbeitt á donskum skúla.

- Samanborið við 1976 hava nógv fleiri børn upplivað hjúnarskilnaðin. Fleiri eru í dag materielt forkelaði, men eisini sosialt forsømd og latin til sín sjálvs, endurgav sálarfrøðingurin danska læraran.

Hann legði afturat, at tað eru ikki fleiri børn við trupulleikum í dag enn áður, men tey, sum hava trupulleikar, dragast við bæði fleiri og størri.

Í eini vælferðaryvirflóð er yrkisleiðin á arbeiðsmarknaðinum vorðin al-



*Stúgvandi fult Norðurlandahús, umleið 400 fólk, vóru komin saman til ráðstevnuna í Norðurlandahúsinum mánadagin, sum Sinnisbati, Føroyski Psykiatriskir Sjúkrarøktarfrøðingar (FPS) og Dansk Psykiatrifond skipaðu fyri*



Bill Justinussen, landsstýrismaður:

# - Fyribyrgja heldur enn bøta um

**Millum pallborðsfólkið eftir fyrilestrarnar var Bill Justinussen, landsstýrismaður í familju- og trivnaðarmálum, og var hann avgjørdur um, hvønn høvuðsboðskap hann hevði tikið til sín. - Málið skal vera at fyribyrgja í staðin fyri at bøta um, segði Bill Justinussen**

RÁÐSTEVNA
*Heini í Skorini*
*heini@sosialurin.fo*



*- Vit mugu satsa uppá at fyribyrgja í staðin fyri at reparera, segði Bill Justinussen, landsstýrismaður, eftir ráðstevnuna í Norðurlandahúsinum mánadagin*

Bill Justinussen var glaður um og nøgdur við tiltakið í Norðurlandahúsinum mánadagin. Hann segði seg hava lært nógv um økið, men av øllum lærdóminum hevði hann serliga bitið merki við ein høvuðsboðskap.

- Eftir mínum tykki kom ógvuliga greitt fram, hvør politikkurin á sálarfrøðiliga økinum skal vera, nevniliga, at vit mugu fyribyrgja í staðin fyri at reparera, vísti Bill á.

Við hesum skal ætlanin sambært landsstýrismanninum vera at fáa sálarligu trupulleikarnar av vegnum, áðrenn teir fáa fastatøkur á einum mannalívi, og við hesum í huga er greitt, at ein frá byrjan av skal gera íløgur í tey, sum arbeiða við børnum og ungum.

### Ein útrætt hond

Landsstýrismaðurin í familjumálum vísir víðari á, at við psykiatribussinum fer ein spjaðing heldur enn ein sentralisering fram av evninum.

- Við hesum átaki fer evnið kring alt landið, í staðin fyri at talan gerst um eina miðsavnan. Við tiltakinum fáa tey 6-8% av børnunum eisini hjálp, sum ongan góðan hava, og er hetta tískil ein útrætt hond frá fyrireikarunum til børnini, sigur Bill Justinussen. Hann leggur afturat, at hann avgjørt hevur fingið íblástur til t.d. trivnaðarkanningar og líknandi tiltøk at fremja í framtíðini.

Landsstýrismaðurin nýtir eisini høvi at takka fyrireikarunum fyri tiltakið.

- Tað er undranarvert, at einstaklingar fáa slíkt tiltak upp á beinini, sum frammanundan arbeiða á einum so tungum og krevjandi øki, sum heilsuøkið er, og tað skulu tey hava rós fyri, sigur landsstýrismaðurin í familju- og trivnaðarmálum, Bill Justinussen, at enda.

samt vanligari, og hetta hevur ført við sær strongd.

- Vandin er størri fyri, at børn ikki fáa sosiala tørvin nøktaðan frá vaksnum, sum nýta alsamt meiri tíð í arbeiði og minni við hús. Við fleiri mammum á arbeiðsmarknaðinum er barnaansing vorðin ein alsamt vaksandi funktión, har ov nógv børn eru til ov fáar barnaansarar, segði Per Schultz Jørgensen. Professarin legði afturat, at alsamt fleiri familjur svíkja børn síni í umsorgan.

- Alkoholtrupulleikar, kynslig misnýtsla, strongd, harðskapur o.s.fr. eru vanligastu orsøkirnar til depressión, og barnið veksur upp uttan nakra trúgv á eitt gott lív, vísti sálarfrøðingurin við sorgblídni á.

### Barnið útvalt og týdningarmikið

Niðurstøða Per Schultz Jørgensen var at fáa aftur føstu karmarnir um eina trygga familjuskipan, har barnið hevur orsøk at vænta sær eitt gott lív í eini sosialari integratión, áliti og tryggleika.

- Menniskjaliga, pedagogiska og fakliga nærveran skal umgyra eitt barn, sum skal hava fleiri álítandi vaksin kring seg. Barnið skal kunna kenna seg útvalt og týdningarmikið, og við støði í hesum idealum er støði lagt og karmarnir skaptir fyri einum framhaldandi sterkum eintaklingi, sum kann yvirliva í einum sosialum vandasamfelagi, vóru millum niðurstøðurnar hjá danska professaranum í sálarfrøði, Per Schultz Jørgensen.

### Politiskur vilji til íløgur

Eftir ráðstevnuna var prát fingið við danska professaran, og spurdur, hvussu hesi ideal hansara skulu realiserast, vísti hann fyrst og fremst á, at politiskt signal og vilji krevst at gera íløgur í tey starvsfólk, sum arbeiða við børnum.

- Um tey ideal, eg nevndi í fyrilestrinum, skulu fullførast, mugu vit skapa so góðar karmar sum gjørligt fyri tey, sum starvast millum børn. Sjúkrarøktarfrøðingar, pedagogar, lærarir, sálarfrøðingar o.s.fr. mugu hava neyðuga grundarlagið at virka á, tí hesi fólk hava størri og størri leiklut í samfelagnum, segði Per Schultz Jørgensen.

Heitið á fyrilestrinum var eisini høvuðsboðskapur sálarfrøðingsins, sum hann í viðtaluni eftir ráðstevnuna endurtók.

- Det er så vigtigt, at et barn i hvert fald har en voksen til hver hånd...!

Heri Kraagesten, orðstýrari:

# - Breiður lurtaraskari

**Eftir ráðstevnuna í Norðurlandahúsinum segði orðstýrarin og sálarfrøðingurin, Heri Kraagesten, at hann serliga var glaður fyri mongu og fjølbroyttu einstaklingarnar, sum vóru møttir upp**

RÁÐSTEVNA
*Heini í Skorini*
*heini@sosialurin.fo*



*Sálarfrøðingurin Heri Kraagesten var orðstýrari á ráðstevnuni í Norðurlandahúsinum mánadagin. - Vit hava avgjørt fingið íblástur til framhaldandi tiltøk, sigur Heri Kraagesten m.a.*

Tá orð varð fingið á Hera Kragesteen eftir ráðstevnuna í Norðurlandahúsinum í gjár, viðmerkti orðstýrarin og sálarfrøðingurin, at hann serliga helt seg hava sæð einstaklingar úr sera ymiskum og fjølbroyttum samfelagsbólkum í Norðurlandahúsinum.

- Umframt at síggja fleiri faklærd fólk, sum arbeiða á sálarfrøðiliga økinum, helt eg meg síggja rættiliga nógvar einstaklingar, sum vóru møttir upp av persónligum orsøkum, og tað er avgjørt gleðiligt at síggja, segði Heri Kraagesten.

Vónað varð sambært sálarfrøðinginum frammanundan, at eisini privatpersónar av egnum eintingum komu, og hann gleddist um, at lurtaraskarin var so breiður í Norðurlandahúsinum undir fyrilestrunum.

### Bussurin eitt framstig

Umframt sjálvt tiltakið vísir Heri Kragesteen á, at psykiatribussurin, sum komin er til Føroya, avgjørt verður eitt framstig fyri sálarfrøðiliga økið í Føroyum.

- Við bussinum, sum komin er úr Danmark, verða umleið 70% av næmingunum í fólka- og miðnámsskúlunum upplýstir um sálarfrøðiligar trupulleikar, og er hetta við til at bróta tabu, sigur Heri Kraagesten.

Spurdur, um talan verður um eitt afturvendandi tiltak við ráðstevnuni og bussinum, er Heri avgjørdur.

- Vit hava við tiltakinum og bussinum í øllum førum fingið íblástur til líknandi tiltøk sjálvi at fremja uttan hjálp úr Danmark, og á henda hátt kann væl hugsast, at stig verður tikið til okkurt líknandi, endar Heri Kraagesten.

Oddbjørg Johansen, fyrireikari:

# - Gott at politikarar vóru við

**Oddbjørg Johansen, sjúkrarøktarfrøðingur, var ein av fyrireikarunum til ráðstevnuna, og var hon serliga glað um luttøkuna frá viðkomandi politikarum**

RÁÐSTEVNA
*Heini í Skorini*
*heini@sosialurin.fo*

Oddbjørg Johansen er ein drívmegi í áhugabólkinum FPS, sum saman við øðrum skipaði fyri tiltakinum í Norðurlandahúsinum mánadagin og sum eisini hevur fingið psykiatribussin til Føroya.

Oddbjørg er serliga glað fyri, at politikarar, sum hava við sálarfrøðiliga økið at gera, vóru at síggja í Norðurlandahúsinum.

- Tað eru jú politikararnir, sum kunnu taka tær stóru avgerðirnar á økinum, og tískil var tað týdningarmikið, at teir vóru við á tiltakinum, sigur fyrireikarin.

### Væntaðu 150 áhoyrarar

Hon vísir víðari á, at tey í fyrstu syftu høvdu væntað umleið 150 áhoyrarar, og tískil var tað sera óvæntað, at umleið 400 fólk høvdu møtt upp.

- Við fjølmenta skaranum var sjón fyri søgn, at áhugi er fyri evninum, og hetta eggjar sjálvsagt at halda fram við líknandi tiltøkum í framtíðini, so vit so líðandi kunnu bróta niður fordómar og tabu á sálarfrøðiliga økinum, sigur fyrireikarin Oddbjørg Johansen at enda.